# Áhugabólkur vil hava leiðara settan

**Áhugabólkurin fyri áhugamálum teirra eldru í Norðoyggjum hevur sent eitt skriv til landsstýrisfólk og fólkavaldu umboðini úr Norðoyggjum, har tey gera vart við sína ónøgd við, at ongin leiðari verður settur til eldrasambýlið undir Kráarbrekku**

ELDRARØKT
*Solby A. Eliasen*



*Áhugabólkurin fyri áhugamálum teirra eldru í Norðoyggjum hevur sent skriv til myndugleikarnir, har staðiliga verður heitt á tey, um at fáa ein leiðara til eldrasambýlið undir Kráarbrekku settan*

Áhugabólkurin sigur, at tað er alneyðugt at ein serstakur leiðari við ábyrgd fyri eldrasambýlinum verður settur. Viðkomandi eigur so eisini at umboða áhugamálini hjá teimum búfólkunum, sum fara at verða har. Men Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum hevur eina greiða og avgjørda støðu til hetta málið. Hann sigur, at tað verður ongin serstakur leiðari settur til nakað eldrasambýli, so longi sum hann er landsstýrismaður. Hann metir tað ikki vera fíggjarliga ábyrgdarfult at gera tað.

Í skrivinum verður millum annað sagt, at tey í eldrabólkinum við miklum harmi og stórari undran hava verið noydd at fylgja við teirri ófatiligu og syrgiligu lagnuni, sum eldrasambýlið undir Kráarbrekku hevur fingið. Tað hevur staðið búgvið til at taka fólk inn í nærum tríggjar mánaðir nú, men onki er hent enn.

Áhugabólkurin vísir á, at tað vegna umsitingarligar tvørleikar frá landsmyndugleikunum, har tað fyrst snúði seg um at fáa sett leiðara, og tá tað starvið við tógvið stríð langt um longi varð greitt, so gjørdist orrusta um, antin slíkt starv skal verða yvirhøvur. Tí spyr áhugabólkurin hvat tað næsta stríðsmálið verður.

Tey fílast samstundis á, at meðan alt hetta hevur gingið fyri seg, so sita eldri og gomul, ið hava sera átroðkandi tørv á at sleppa inn, uttan at fáa nakra veruliga frágreiðing.

At enda heitir áhugabólkurin staðiliga á allar góðar kreftir um at gera alt, ið gerast kann til tess at fáa eldrasambýlið at lata upp fyri borgarunum alt fyri eitt, og vísa tey á tann øgiliga tørvin, sum er á økinum.

Skrivið er undirskrivað av øllum seks limunum í áhugabólkinum, og tær eru: Maria Klein, húsmóðir, Kala Lómaklett, sjúkrahjálpari, Gerda Absalonsen, vinnurekandi, Rannvá Isaksen, sjúkrahjálpari, Amalia Hansen, vinnurekandi og Ragna Djurhuus, sjúkrarøktarfrøðingur.

# FNU fegnast um rapsoljubilin

NÁTTÚRA
*Tíðindaksriv frá Føroya Náttúruverndarfelag*

Tíðindaskriv frá Nordvestjysk Folkecenter for Vedvarende Energi. (NFVE)

Ein av undangongumonnunum innan náttúru- og umhvørvisverndvernd Erling Simonsen, hevur sum fyrsti norðurlendingur og føroyingur tikið stig til at konvertera bil sín ein VW LUPO 3L til rapsolju. Vanligir dieselmotorar kunnu uttan hóvasták umbyggjast til at koyra uppá rapsolju, men VW LUPO hevur ein framkomnan 3 cylindara hátrýst dieselmotor við beinleiðis innspræning, og hevur NFVE í samstarvi við Elsbett-Motor granskingardepilin í Týsklandi ment hesa nýggju tøknina.

Preben Megaard leiðari á NFVE og varaforseti í Eurosolar sigur m.a. frá, at fyri hvørji 2 kilo av fóðurprotein verða 1 kilo av olju og 4 kilo av hálmi.

Ein hektar dyrkilendi gevur góðar 35.000 kilometrar bilkoyring við bili, og er her talan um gangnýtslu av varandi orku. Danir kunnu á 300.000 hektarum framleiða rapsolju til eina millión Lupobilar, ið koyra góðar 10.000 kilometrar um árið.

Erling Simonsen sigur frá, at bilurin nú koyrur sum ein dreymur, og at hann sjálvandi er errin av av hava fyrsta framkomna super-bilin í Norðanlondum, óheftan av bæði Shell og Statoil. Gleðin er fullkomin og samvitskan rein nú koyrast kann 100% náttúruvinarligt.

Vit ynskja Erling og Jórun Simonsen alt tað besta við nýggja bilinum og vóna at síggja tey ofta og títt á føroyska vegunum.

Søkt verður eftir

LÆRLINGI Í SALTANGARÁ

at byrja sum skjótast

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði

**Vit vænta:** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2003

Sendast til:

P/F Hjá Fróða

Yviri við Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 310808 · fax 314676 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

# Tórbjørn sýnir fram í Fokusi

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Fríggjadagin 28. februar kl. 16 letur Torbjørn Olsen upp málningaframsýning í Galerie Focus í Havn. Myndevnini eru millum annað lýsingar av fólki og náttúru.

Framsýningin hjá Torbjørn Olsen í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 verður frá 28. februar til 14. mars og opið er týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18, leygardag kl. 16 til 18.

Fernisering er fríggjadag 28. februar kl. 16 til 18.





# Spara fleiri milliónir um árið

**Verður tunnilin ímillum Øravík og Hov lagdur har, sum Petur Hammer hevur skotið upp, fer tað at spara suðuroyingum fleiri milliónir um árið**

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*



*Hendan myndin vísir, hvussu stórur munur er á teimum báðum uppskotunum, sum eru gjørd til tunnil ímillum Øravík og Hov. Ringurin høgrumegin vísir, har landsverkfrøðingurin ætlaði at gera tunnilin í 140 metra hædd. Ringurin vinstrumegin vísir, hvar NCC hevur bjóðað sær til at bora hann í 40 metra hædd. Verður hetta uppskotið valt, slepst undan einum longum strekki av fjallavegi er tað ringasta í Suðuroynni at koyra hjá lastbilum við eini brattari brekku og tveimum svingum uppá næstan 180 stig*

**Suðuroy:** Verður tunnilin, sum ætlanin er at gera ímillum Øravík og Hov, lagdur har Petur Hammer hevur skotið upp, heldur enn har sum Landsverkfrøðingurin ætlar at leggja hann, verður tunnilin ikki bara nógv betri og bíligari at gera.

Hann fer eisini at føra til eina sparing hjá suðuroyingum uppá fleiri milliónir um árið.

Hetta vísa útrokningar, sum verkfrøðingurin Gudfinn Olsen og lærarin, Poul Erik Smedemark, ið báðir undirvísa á Miðnámsskúlanum í Vági, hava gjørt.

Tá ið tað kom fram, at Landsverkfrøðingirn ætlaði at leggja tunnilin ímillum Øravík og Hov í 140 metra hædd omanfyri Hov, vendi Petur Hammer, byggimeistari á Tvøroyri, sær av sínum eintingum til NCC og spurdi um tað ikki bar til at leggja tunnilin niðri í dalinum. Hetta er 100 metrar lægri enn Landsverkfrøðingurin ætlaði at leggja tunnilin.

Við útgerðini, sum Landsverkfrøðingurin hevur, verður hann noyddir at leggja tunnilin eftir jarðfrøðini í økinum og ikki har hann liggur best fyri ferðsluna.

Men NCC hevur so framkomna útgerð, at teir kunnu bora tunnilin, har hann er best fyri ferðsluna, uttan at hugsa um jarðfrøðina.

Tunnilin, sum Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp, verður 2,1 kilometrar langur, men harafturat skulu 4,2 kilometrar av vegi gerast afturat. Hesin tunnilin verður í 140 metra hædd Hovsmegin og tilsamans fer arbeiðið at kosta ímillum 120 og 130 milliónir.

Tunnilin, sum NCC bjóðar sær at gera, verður 2,5 kilometrar, men har skal ongin vegur gerast. Hesin tunnilin verður heilt niðri við sjógvin og hann kostar einar 92 milliónir, ella góðar 30 milliónir minni enn tann hjá Landsverkfrøðinginum.

Tí er ongin ivi um, hvat er tann besta loysnin.

## Stór sparing

Men hetta eru ikki einasti fyrimunurin við uppskotinum hjá Petur Hammer.

Teir báðir studentaskúlalærararnir í Vági, Gudfinn Olsen, verkfrøðingurin og Poul Erik Smedemark, matematiklærari, hava roknað út, at tunnilin, sum NCC bjóðar sær til at bora, fer at spara suðuroyingum fleiri milliónir um árið.

Í talvuni, sum stendur við greinini, sæst, at tað eru 25 kilometrar ímillum Vág og Tvøroyri sum er. Verður tunnilin hjá Landsverkfrøðinginum valdur, styttist teinurin niður í 22,2 kilometrar og verður tunnilin sum NCC kann bora eftir uppskoti frá Petur Hammer gjørdur, styttist strekkið niður í 19,4 kilometrar.

Teir báðir hava mett, at 1.000 bilar fara at koyra ímillum um dagin. Hetta talið byggir á, at uppteljingar vísa, at í 2000 koyrdu yvir 800 bilar ímillum um dagin.

Teir hava somuleiðis roknað við, at tvey fólk eru í hvørjum bili og at miðalferðin er 60 km/t.

Sostatt fer tunnilin hjá Landsverkfrøðinginum at spara suðuroyingum 34.000 tímar í ferðing um árið, men uppskotið hjá Petur Hammer og NCC fer at spara 68.000 tímar.

Siga vit, at hvør tími kostar 100 krónur er skjótt at rokna seg fram til, at talan er um eina sparing uppá fleiri milliónir um árið.

Samstundis fer tunnilin hjá Landsverkfrøðinginum at føra til at 100.000 litrar av brennievni verða spardir, men hitt uppskotið førir til eina sparing uppá 240.000 litrar, so aftur her er ein milliónupphædd at spara. Og at enda kann vísast á, at nakrar hundrað túsund krónur eru at spara í dekkum, tí jú styttri leiðin er, jú minni verða dekkini slitin.

Men umframt allar hesar fyrimunirnar, fer uppskotið hjá NCC og Petur Hammer at føra við sær, at vegurin fer at krevja minni røkt, eitt nú asfaltering og bilaverjur og ikki minst, eisini minni kavarudding og tað er eisini ein fíggjarligur fyrimunur. Lagt verður eisini afturat, at verður uppskotið hjá Petur Hammer fylgt, fer miðalferðin á bilunum helst eitt sindur upp, tí vegurin verður nógv sléttari og beinari at koyra eftir, men tað ger so bara teir fíggjarligu fyrimunirnar enn størri. (Sí talvu).

Men samanumtikið er talan um eina sparing uppá fleiri milliónir um árið, umframt at sjálvur tunnilin er væl bíligari at gera, so fíggjarligur fyrimunirnir av uppskotinum hjá Petur Hammer verða bara sjónligari og sjónligari.

| | Nú | Uppsk. hjá Landsverk | Tunnil sum NCC kann bora |
|---|---|---|---|
| Strekkið Vágur -Tvøroyri (km) | 25 | 22,2 | 19,4 |
| Styttri vegur ( km) | 0 | 2,8 | 5,6 |
| Meðalferð (km) | 60 | 60 | 60 |
| Tíð at koyra ímillum (minuttir) | 25 | 22,2 | 19,4 |
| Tíðarsparing | 0 | –2,8 | –5,6 |
| Tíðarsparing um árið (tímar) | 0 | –34.000 | –68.000 |
| Spart brennievni (litrar) | 0 | –100.000 | –240.000 |
| Dekkslit (tal av dekkum) | 0 | –200 | –400 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv er at spara hvørt einasta ár, verður tunnilin ímillum Hov og Øravík lagdur, har Petur Hammer hevur skotið upp, heldur enn at leggja hann har, landsverkfrøðingurin hevur ætlað at bora. Í Talvuni er roknað við, at 1.000 bilar brúka tunnilin um dagin, at tvey fólk eru í hvørjum bili og at eini dekk halda 20.000 kilometrar*




*Hendan myndin vísir tunnilsmunnan í Hovi, eftir uppskotinum hjá Petur Hammer og NCC. Talan er um ein sléttan, beinan veg niðri í dalinum. men verður uppskotið hjá Landsverkfrøðinginum valt, slepst ikki undan eini drúgvari brekku av fjallavegi*